Løgtingslóg

um

at geva Húsalánsgrunninum ræðið á bygninginum Eirargarður 2 í Tórshavn

§ 1. Húsalánsgrunnurin hevur ræðið á bygninginum Eirargarður 2 á matr. nr. 1000a í Tórshavn og kringliggjandi øki, sum natúrliga er knýtt at bygninginum, sí tó stk. 2.
Stk. 2. Hóast ásetingina í stk. 1 varðveitir Heilsumálaráðið nýtslurætt á niðastu hædd í bygninginum og lága bygninginum niðan móti Frælsinum, til annað verður avtalað millum landsstýrisfólkið, sum varðar av hesi løgtingslóg, og landsstýrisfólkið í heilsumálum. Somuleiðis varðveitir Heilsumálaráðið atkomurætt til niðastu hædd og lága bygningin í tann mun, tað er neyðugt fyri virksemið, sum er har.
Stk. 3. Húsalánsgrunnurin verður ikki skattaður av møguligum virði á ræðisrættinum sambært stk. 1; somuleiðis kann Húsalánsgrunnurin ikki skattliga avskriva virðið av ræðisrættinum.
Stk. 4. Umbygging og umvæling, sum Húsalánsgrunnurin ger í bygninginum sambært § 4, stk. 2, er fevnd av § 3 b í løgtingslóg um meirvirðisgjald.
Stk. 5. Kravið um sundurbýti, tá partur av føstum eigindómi verður latin øðrum til brúks longur enn 10 ár, sum ásett er í § 15, stk. 1 í løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m., er ikki galdandi fyri ræðisrættin hjá Húsalánsgrunninum sambært § 1, stk. 1, sjálvt um hesin er longri enn 10 ár.

§ 2. Húsalánsgrunnurin kann, við góðkenning frá landsstýrisfólkinum, taka lán við veð í bygninginum fevndum av § 1, stk. 1.
Stk. 2. Veðhald sambært stk. 1 kann bert veitast fyri lán til endamál sambært § 4, stk. 1 og 2.
Stk. 3. Veðhald sambært stk. 1 skal tinglýsast sum triðjamansveð.
Stk. 4. Bygningurin Eirargarður 2 á matr. nr. 1000a, Tórshavn, verður í tinglýsingarhøpi eftir umbøn stovnaður og viðgjørdur sum ein bygning á fremmandari grund samsvarandi verandi skipan í § 19, stk. 1, í løgtingslóg um tinglýsing.
Stk. 5. Við afturhandan av ræði á bygninginum til landsstýrið sambært § 7, yvirtekur landskassin tær skyldur, sum knýta seg at tinglýsta veðhaldinum, tó í mesta lagi ta skuld, sum, tá afturhendanin fer fram, er eftir av lánum, tikin við heimild í stk. 1.

§ 3. Bygningurin skal nýtast til lestrarbústaðir og ungdómsbústaðir.
Stk. 2. Undir serligum umstøðum kann Húsalánsgrunnurin, við góðkenning frá landsstýrisfólkinum, leiga bústaðir í bygninginum út til onnur enn ung ella lesandi.
Stk. 3. Leigumál sambært stk. 2 skulu vera tíðaravmarkað til í mesta lagi 2 ár.

§ 4. Húsalánsgrunnurin rekur, umsitur og heldur viðlíka bygning og kringliggjandi øki fevnt av § 1, og ber kostnaðin av hesum.
Útreiðslur, sum standast av nýtslurættinum og atkomurættinum hjá Heilsumálaráðnum sambært § 1, stk. 2, ber Heilsumálaráðið.
Stk. 2. Húsalánsgrunnurin umbyggir og umvælir bygningin í tann mun, tað er neyðugt fyri endamálið sambært § 3, stk. 1, og ber allar útreiðslur í hesum sambandi.

§ 5. Húsalánsgrunnurin kann ikki útleiga bygningin sum eina eind.
Stk. 2. Undir serligum umstøðum kann Húsalánsgrunnurin, við góðkenning frá landsstýrisfólkinum, leiga partar av bygninginum út til almennar stovnar.

§ 6. Landsstýrisfólkið ásetir reglur fyri, hvussu Húsalánsgrunnurin tillutar leigumál í bygninginum, undir hesum krøv til lestrarvirkni og aldursmark o.a.

§ 7. Eru stýrið fyri Húsalánsgrunnin og landsstýrisfólkið samd um tað, kann Húsalánsgrunnurin lata ræðið sambært § 1, stk. 1, aftur til landsstýrið. Landskassin tekur tá við teimum skyldum, ið knýta seg at bygninginum, undir hesum møguligari skuld við veð í bygninginum, samanber § 2, stk. 5.
Stk. 2. Við afturhandan hevur Húsalánsgrunnurin rætt til endurgjald úr landskassanum svarandi til bókað virði av íløgum, sum Húsalánsgrunnurin hevur gjørt í bygningin.

§ 8. Landsstýrisfólkið ásetir í kunngerð, nær løgtingslógin kemur í gildi.

Samtykt á Løgtingi hin 30. september 2025 við 22-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 30. september 2025

stjóri

LM-002/2025